ð fótbólti

Landslið og steyp

Hóast tað ikki var talan um nakran skipaðan landsliðsfótbólt fyrstu mongu árini av søguni hjá MB, so vóru føroysk úrvalslið av og á og royndu seg uttanlands.

Fyrsta ferðin av hesum var í 1910, tá eitt føroyskt lið fór til Bergens at royna seg. Her átti MB tríggjar leikarar, og vóru hesir Godtfred Heinesen, sum var málverji, Jóan Pauli Ellefsen og Heini Joensen. Úrslitið var tó ikki nakað at reypa av. Føroyska liðið tapti ikki minni enn 7-0, men í øllum førum, so fingu leikarar á hesum liðnum eina góða ferðauppliving, og ikki minst lærdóm um, hvussu fótbólturin varð leiktur aðrastaðni enn í Føroyum.

Og so kunnu miðvingarnir helst eisini erpa sær av, at teir vóru teir fyrstu, sum vunnu eina veruliga føroyska kapping. Hetta hendi, eftir at bretski konsulin, A.C. Coates, lat eitt sera vakurt steyp til FBU. Eitt steyp, sum var stoypt á royalu verksmiðjuni í London.

Fyrsti finaludysturin í kappingini um steypið stóð í 1914 millum MB og TB, og her eydnaðist miðvingum at vinna. Kappast varð í nøkur ár um hetta steypið, men FBU varð ikki langt lív lagað, og í 1918 var tann kappingin í øllum førum av.

Gysari í FM-finalu

Tað tóktist eisini, sum var føroyskur fótbóltur í einum lítlum aldudali hesa løtuna. Bløðini gera ikki stórvegis burtur úr nøkrum dystum gjøgnum 20'ini. Nakað verður tó sagt frá, og í minnisritinum hjá MB verður víst á einstakar dystir, sum felagið leikti hesi árini.

Tríatiárini vóru tó tíðin, tá gongd spakuliga kom á aftur. Farið varð nú eisini at tosa um møguleikan at skipa fyri eini veruliga føroyameistarakapping. Ikki minst kom lív av álvara í, tá mongu bretsku hermenninir komu til landið. Í 1942 varð so fyri fyrstu skipað fyri FM-kapping, og vann KÍ hetta árið.

Verður sæð burtur frá kappingini um Coates-steypið, sum helst var at rokna sum eitt meistaraheitið tá, so er enn ikki eydnast MB at gerast føroyameistari í bestu mansdeildini. Longu í 1943 var tó heilt nær við, tá MB leikti seg fram til finaluna, har TB stóð fyri framman. Í hálvfinaluni leikti felagið móti KÍ, og tann dysturin verður í gerðabókini lýstir soleiðis.

» Úrslitið av hesum dysti varð tað, at MB vann 3-1. Hesin dystur var sera forvitnisligur og væl umtalaður í bløðunum, sum skrivaðu, at leikurin var góður, men at miðvingar royndust væl betur enn klaksvíkingar henda dagin. Serliga róstur vórðu vinstri og høgru veingirnir, brøðurnir Laurentius og Torstein Haldansen.«

Og hóast tað síðani gjørdist til tap í finaludystinum móti TB, so gjørdist her talan um ein dyst, sum helst seint verður gloymdur av teimum, sum høvdu høvið at uppliva. Aftur leita vit til gerðabókina.

»Hesi bæði liðini sýnast at vera javngóð, og eftir hvat í bløðini skriva, var úrslitið av kappingini rættvíst eftir spælinum at døma. Annars siga bløðini, at hesin dystur var sera forvitnisligur. Bæði feløgini sýndu góðan leik og fótbóltsteknikk, sum ikki ofta er at síggja á Havnar leikvølli. Og hin stóra áskoðarafjøldin stóð líka spent til seinasta minutt, hóast spælt varð í 2 tímar og regnið oysti niður.«

Úrslitið av tí dystinum gjørdist javnleikur 2-2, og hóast longda leiktíð, so fall eingin avgerð. Viku seinni var so nýggjur finaludystur á skránni, og aftur stóð á jøvnum. Støðan eftir vanligu leiktíðina var 0-0, men tá TB so fekk avgerandi málið í umdystinum kundu teir rópa seg føroyameistara.

Úrslitini tala annars fyri, at MB hevði eitt sera gott lið hetta árið. Eitt nú vórðu fimm dystir móti bretskum liðum á skránni, og bert ta einu ferðina vóru miðvingar við undirlutan.

Hondbóltur uppí

Krígsárini kom hondbóltur eisini á skránna í MB. Kvinnurnar úr miðvági gjørdu eisini nógv um seg, og í 1944 leiktu tær seg fram til finaluna, sum var móti Vípuni av Sandi. Her gjørdust tær úr Miðvági tó ov stuttar, soleiðis at steypið fór til Sandoynna.

At byrja við varð hondbólturin skipaður sum serstøk deild undir MB, men seinni varð Ternan sett á stovn til endamálið. Hetta felagið var eisini aktivt í nógv ár, og fleiri ferðir høvdu tær hug at ota seg heilt upp móti oddinum av føroyskum hondbólti.

Upp og niður

Sum nevnt áður í greinini, so var sandurin í Miðvági fyrsti heimavøllur felagsins. Fram til 1969 hevði felagið ikki nakran vøll, sum tey kundu rópa sín egna, men eisini hetta stóð til at broyta. Við sjálvbodnari arbeiðsmegi frá bygdarfólkinum varð ein vøllur gjørdur, og á sumri hetta árið hevði MB so egið grús undir fótunum.

Tað fekk sum vera man eisini áhugan fyri spælinum at vaksa. Føroyskur fótbóltur var um hetta mundi býttur upp í meistara- og meðaldeild, men tá kappingin í 1975 varð umløgd til at fevna um tríggjar deildir, máttu miðvingar taka til takkar við plássi í aðru deild. Longu í 1977 eydnaðist tó felagnum at vinna deildina, og í fyrstu royndini hildu teir fast í plássinum í trý ár. Í 1980 var liðið tó aftur í aðru deild, men hóast teir tá hildu seg hava vunnið deildina, so endaði eitt langt trætumál við, at tað ístaðin gjørdust leirvíkingar, sum fluttu upp.

Árið eftir eydnaðist tó MB at vinna oddasessin í deildini, so uppflytingin kundi gerast veruleiki, men hesaferð varð steðgurin bert eitt ár. Undan 85 ára degnum slapp felagið sær tó aftur fram í fremstu rød, soleiðis at teir í 1990 kundi spæla í bestu deildini. Tað var tó misjavnt, hvussu gekst hesi árini, og saman við SÍF tóktist MB at vera eitt lið, sum ferðaðist millum bestu og næstbestu deildina hesi árini.

Í 1994 vórðu so stig tikin til stovnanina av FS Vágum. Fyrsta árið eydnaðist væl, og í 1995 skuldi samansetta liðið royna seg í bestu deildini. Tað tóktist eisini ganga rætta vegin, men eftir fyrstu árini tók aftur at ganga niðureftir. FS Vágar hevur fyri tað mesta yvirtikið leiklutin frá upprunafeløgunum sum elevatorlið, og í fjør gjørdi MB av at taka seg úr samstarvinum.

Hetta hevur í fyrstu atløgu merkt, at felagið skal spæla í 4. deild, nú 100 ára dagurin stendur fyri framman, men hetta tykist tó á ongan hátt hava tikið móti frá miðvingum. Felagið hevur við eini væl skipaðari ungdómsdeild sum útgangsstøði sett sær nýggj mál fyri framtíðina. 100 ár av fótbóltssøgu eru ikki soleiðis at skúgva til viks, og vónina um enn eitt blómandi tíðarskeið fyri fótbóltin í Miðvági er tað eingin, sum fær tikið frá MB.

Hjartaliga tillukku við degnum.

December 1989

Myndin er av MB-lið 1913. Tvi siggjast her við á øru vakra Coates-steypinum. — Afturá: Jóan Hans Jacobsen, Jógvan Thomsen, Sóvend Jákup Johansen, Hans Samuelsen og Sóvend á Tóft. Miðrekk f.v.: Andreas Joensen, Jógvan Joensen og Jóan Henrik Johannesen. Framan á f.v.: Hans Dánjal Joensen, Godtfred Heinesen og Mikkjal Heinesen.

Teir fyrstu dystirnir

Hvussu ofta dystir varð spældur tá, er ikki lætt at sigja, tí ikki verður sagt so nógv um slíkt í bløðunum, men 1. august 1908 skrivar Dinna um sín dyst millum HB og MB. Sagt verður m.a., at miðvingarnir koma við bíti um 3-0 í sínum seinnapartsin og dysturin byrjaði ikki fyrr enn kl. 8 á kvøldi. «I første halvleg lykkedes det Thorshavnerne at gøre mål ved hjælp af et straffespark, og spænding skønt dette da dårligt blev til noget da det blev holdt tre gange igennem indtil lyset slukkes det Miðvingerne havde en udmærket midtmand. Resultatet blev oddeles 4 mål mod 3».

30. september næsti ár verður sagt frá stórum dysti í Miðvági millum MB og HB. Henda dystur varð HB 3-2, og lagt verður aftur: «Der lånes fra Miðvingernes side vist en udpræget geestfriheid mod Thorshavnerne der ikke tog afsted fra hensd oddetiden tranding morgen».

Á Ólavsøku 1909 vóru miðvingar í Havn og spældu móti HB. Inntíðindagta til henda dyst er til skjals enn í dag.

Triggir Málarar á fyrsta landsliðsnuma

Í 1910 fór eitt sameinað føroyskt lið til Bergen at spæla. Hetta var fyrsta føroyska «landsliðið», um vit hanna kalla tað so. Við á hesum lið vóru triggir Málarar, tað vóru Godtfred Heinesen, sum var málverji, Jóan Pauli Ellefsen og Heini Joensen. Hinir leikararnir vóru úr HB og TB. Úrslitið var ikki nokað serligt, eitt tapsapp 0-7, sum føroyingar vóru heldur ikki so vanir við frálíkt í 1910. Innhjálpagta til hesa ferð er eina til skjals, hon er dagfest 18. mars 1910, og er undirskrivað Kaniin for en fodboldkamp til Bergen.

«Fótbólts-presturinn» fyrsti formaður hjá FBU

Ólavsøkudag 1913 var Faroernes Boldspil Union (FBU) stovnað. Eitt av tí sum var Carl Johansen undirgongumaður. Hann gjørdist eisini formaður í ár fyrsta nevninni. Blaðið siger frá, at tá ella undirbúnaðurin var hesin skrivað undir stovningsskjalið «undertegnede skønt gentem et lyst for Unionen, hvilket bevaredes ved at bredige barnet».

Coates-steypið

Bretski konsulin Coates gav FBU eitt sera vakurt steyp, sum tey føroyskir fótbóltsklúbbir skuldu kappast um. Í mars 1914 var so finaludysturin millum MB og TB. MB vann steypið og á ti-seinstu, umframt nærmi á allan leikarasnar hjá MB: Challenge Cup presented to the Football Clubs of the Faroe Isles by A.C. Coates, British Consul at Thorshavn 1913.

Ikki var FBU langt lív lagað, tað dett aftur í bangin í 1918.

Friðarligt í 20'unum

Hjá eitt sera bilag við 86 ártøl á hakli, skriva ikki undan at tað lava varið tíðir, har aktivitetin hevur verið mikil, og eg eftir aftur tíðir, har hann hevur verið minni, og eg eftir aftur tíðir, har hann hevur verið stórt.

Tí er ongin ivi um, at tíðin millum 1920 og 1930 var ein av tí betri, sum fótbóltur er at finna í Føroyum. Tíðin var friðarligt og mest um at leggja til Kapteyn Restorff allan ár fyrsta fótbólts-klúbbin.

Liv í aftur felagið

Í 1920-ununum byrjar so undir at lenva liv í aftur, og verðir undir [illegible] heimbarstaga vóru nógv dystir, [illegible] [illegible] hetta. Innmannanna, sum ja vóru sum ungir í Vágum.

Tvørrt er ongin ivi um at skrivlígum tillati viðvikjandi MB at finna sum [illegible] [illegible] krigsins er eitt sindur til og tað er sum vera sum ábúgavert. Her skulu nøkrar hvat er gerðabókini verða endurgivin.

Í 1943 kom MB í finaluna í landsskappingini. Í semifinaldystinum, 5. sept., spældi MB móti KÍ, dysturin varð spældur í Havn. Í gerðabókini standur m.a.: «Úrslitið av hesum dysti var tað at Miðvág vann 3-1. Hesin dystur var sera forvitnisligur og vel umtalaður í bløðunum, sum skrivaðu at leikurin var góður, men at miðvingar royndust betur enn klaksvíkingar henda dagin. Serliga róstur vórðu vinstri og høgru veingirnir, brøðurnir Laurentius og Torstein Haldansen».

Tíðsla var spælt eina TB. Tann 18. sept. 1944. Úrslitið var jevnt [illegible] 2-2 hóast spælt var bæði tann [illegible] [illegible] [illegible]